RÚSDREKKASØLA LANDSINS

Vinnunevndin
c/o Føroya løgting
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn
Att. Anna Rein

**2. november 2018** **J. nr: 18/00136-5** **Tygara j. nr.:**


**Høvuðsskrivstovan**
Skálatrøð 14
P.O. Boks 3069
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

T: +298 340 400
F: +298 340 490
E: rusan@rusan.fo
www.rusan.fo


**Viðmerkingar til "Løgtingsmál nr. 17/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutning og sølu av rúsdrekka" - Uppskotssetari: Magni Laksáfoss, løgtingsmaður**

Rúsdrekkasøla Landsins er vorðin kunnug við, at Magni Laksáfoss, løgtingsmaður hevur sent málið omanfyri í Løgtingið. Málið snýr seg um "liberalisering" av rúsdrekkamarknaðinum í Føroyum.

Rúsdrekkasøla Landsins (RSL) er ikki kunnað ella hoyrd í samband við hesa ætlaðu broytingina. Okkara viðmerkingar til málið eru tó hesar.

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at geva føroysku bryggjaríunum loyvi at selja "egna framleiðslu" í teirra sølubúðum. Broytingin merkir sostatt, at markið á øli á 5,8 rúmprosent verður strikað, og harafturat at spiritus við alkoholstyrki á upp til 60 rúmprosent kann seljast í sølubúðunum hjá framleiðarum.

Í almennu viðmerkingunum verður sagt, "*Løgtingið hevur áður broytt rúsdrekkalógina, soleiðis at bryggjaríini kunnu bryggja sterkari øl og rúsdrekka. Henda liberaliseringin hevur givið hópin av nýggjum framleiðslum og hevur breiðkað vøruúrvalið munandi.*"

Eftir at tað 2. apríl 2012 bleiv loyvt at selja øl sterkari enn 5,8 rúmprosent, fingu føroyskir framleiðarar møguleikan at framleiða og selja hesar gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins.

Síðani tá eru tólv ymisk sløg av føroyskt framleiddum øl við styrki yvir 5,8% komnar á marknaðin og av teimum eru bert sjey sløg framvegis á marknaðinum:

- "Okkara" hevur framleitt átta ymisk sløg í hesum tíðarskeiði. Av hesum eru 5 framvegis at fáa.

- "Føroya Bjór" hevur framleitt 4 ymisk sløg í hesum tíðarskeiði. Av hesum eru 2 framvegis at fáa.

Føroya Bjór kom við tveimum sløgum av brennivíni í des. 2017 og enn einum slag í juli 2018. Sostatt selur RSL í dag 3 sløg av føroyskum brennivíni: Akvavit, Vodka og Gin framleitt av Einar's Distillery. Tó eru fleiri sløg á veg t.d. whisky.

**Rúsdrekkasøla landsins**

Rúsdrekkasøla Landsins virkar eftir greiðum málum við støði í rúsdrekkalógini. Málið er bæði at virka fyri at veita eina so góða tænastu sum gjørligt og at tálma nýtsluni, samsvarandi andanum í lógini. Atkoma og prísur ávirka rúsdrekkanýtsluna, og Rúsdrekkasølan hevur virka væl, sum alkoholpolitiskt stýringsamboð hjá landinum. Føroyingar keypa/nýta veikari og væl minni sterkt rúsdrekka nú, enn teir gjørdu fyrr. Nøgdsemið við tænastu og úrvali er sera gott millum fólk og aldursmarkið á 18 ár verður strangliga hildið.

Landsfyritøkan rekur 8 handlar, sum hava eitt breitt og fakliga væl grundað úrval. Hesir handlar verða riknir eftir málsetninginum tvs. verða riknir eftir vinnuligum grundarlagi við atliti til at minka og avmarka nýtsluna í Føroyum.

Rúsdrekkasølan stendur fyri uml. 2/3 av seldum alkohol litrum, ið seldir verða í Føroyum, meðan føroyskir framleiðarar standa fyri seinasta triðinginum, ið teir selja úr egnum sølubúðum. Um tollfría sølan verður tikin við í samlaðu nýtsluna, verður mett at Rúsdrekkasølan stendur fyri helvtini, føroyskir framleiðarar 25% og tollfrítt 25%.

Rúsdrekkasølan skal eisini geva avlop hvørt ár, umframt mvg, avgjøld/toll o.l. - Hetta avlopið, sum kann metast sum ein eyka rúsdrekka-skattur, ið liggur fast, og ikki fylgir konjukturi og aktiviteti annars. Í Fíggjarlógini fyri 2018 er avlopskravið 16,048 mió kr.

**Uppskotið**

Uppskotið hevur við sær alkoholpolitiskar- umframt fíggjarligar avleiðingar fyri bæði landið og Rúsdrekkasøluna. Vit halda, at broytingin kann ávirka og vaksa um rúsdrekkanýtsluna í Føroyum.

Uppskotið leggur í stuttum upp til, at sterkt øl og spiritus verður selt í sølubúðunum hjá føroyskum framleiðarum.

Hetta fer at hava við sær, at tað verður munandi meira atkomiligt og lættari at fáa hendur á sterkum løgi. Bryggaríini hava í dag eins nógvar handlar/útsølur sum rúsdrekkasølan. Tað ber til at siga, at rúsdrekka er vorðið dupult so lætt atkomiligt. Vert er eisini at hava í huga, at endamálið hjá privatum fyritøkum er vinningur, meðan tað hjá Rúsdrekkasøluni er at veita eina so góða tænastu sum gjørligt og samstundis avmarka nýtsluna. Vit meta at uppskotið er ímóti andanum í rúsdrekkalógini.

Rúsdrekkasølan leggur ein fastan vinning á rúsdrekka, sum skal tryggja raksturin umframt avlopskravið til landskassan. Hetta ger, at prísurin virkar tálmandi.

Bryggjaríini skulu ikki lata eitt avlopskrav til landskassan, og fáa tey tí ein munandi fyrimum, og kunnu tí selja vøruna munandi bíligari enn Rúsdrekkasølan.

Hetta hevur við sær eina ójavna kapping, sum ikki burdi verið millum Rúsdrekkasøluna og tað privata.

Tað kann leggjast afturat, at í hinum norðanlondunum (Svøríki, Ísland, Finland, Noreg) við somu rúsdrekkasøluskipan sum vit, har selja bryggaríini ikki øl og sterkari løg beinleiðis til brúkaran.

Um uppskotið vinnur frama, verður talan um munandi umfordeiling av pengum frá landskassanum til privatar fyritøkur.

Tí er neyðugt at spyrja:

- Er tað røtt leið, at máa grundarlagið undan alkoholpolitiska stýringsamboðnum hjá landinum
- Er tað røtt leið, at gera tað lættari at fáa hendur á sterkum løgi
- Er tað røtt leið, at sterkt øl og rúsdrekka skulu seljast saman við sodavatni
- Er tað røtt leið, at missa tamarhaldið á útsøluprísinum á sterkum løgi
- Er tað røtt leið, at skapa kapping millum alment og privat, tá tað snýr seg um spiritus og sterkt øl

**Rúsdrekkasøla Landsins mælir frá at hetta broytingaruppskotið verður samtykt.**

Um Rúsdrekksølan í framtíðini skal rekast sum ein vælvirkandi stovnur, ið tekur ábyrgd av teimum samfelagsligu avleiðingunum, sølan av vøruni hevur við sær, og har vinningur ikki er ein motivatiónsfaktor, mæla vit frá at man spakuliga máar grundarlagið undan stovninum og harvið ger tað trupulari at reka stovnin.

Vit mæla tí staðiliga frá, at uppskotið verður samtykt.

Er ynski um, at fleiri aktørar enn Rúsdrekkasølan skulu virka á marknaðinum er neyðugt, at allir aktørar virka undir somu treytum hvat avgjøldum, avlopskravi, tolli v.m. viðvíkur.

Soleiðis er tað ikki í dag.

RÚSDREKKASØLA
LANDSINS

**Fleiri góðar grundgevingar eru fyri, at Rúsdrekkasølan verður varðveitt sum nú:**

• Rúsdrekkasølan skal virka fyri at avmarka rúsdrekkanýtsluna. Hetta hevur hon gjørt, síðan hon kom, og vanarnir hjá fólki eru broyttir frá sterkum løgi til veikari løg

• Rúsdrekkasølan bjóðar eitt breitt og fakliga væl grundað úrval, og hetta úrvalið megna smærri sølustøð ikki at bjóða.

• Handilsliga loysir tað seg best at selja tað, sum gongur best, og smærri sølustøð fara tí kanska at hugsa mest um avlop heldur enn tálming

• Við Rúsdrekkasøluni sum meginstovni fyri rúsdrekkasølu ber til at tálma nýtsluni, tí stovnurin er strangt reguleraður og tekur sambært lógini samfelagsatlit

• Aldursmarkið á 18 ár verður strangliga hildið í Rúsdrekkasøluni. Sannlíkt er, at verri verður at halda aldursmarkið á smáum sølustøðum uttan fyri Rúsdrekkasøluna

Vinarliga

Rógvi A. Fossádal
Stjóri